# Stevna innkeyparum á ársfund



Birgir Poulsen hevur drúgvar royndir í marknaðarføring innan heilsølu og detail handil.

Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com

**Ikki óvæntað er aftur full høll av framsýnarum, nú Vørumessan letur upp til ársins stevnu fyri heilsølur og innkeyparar; roknað verður við at eini 2000 fólk fara at vitja teir 40 básarnar**

MARKNAÐARFØRING
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Síðani 1998 hevur handils snildingurin Birgir Poulsen, umframt sítt dagliga arbeiði sum stjóri í vøruinnkeyps ketuni Merko, havt eitt afturvendandi árligt tiltak: Vørumessan. Tiltakið, sum við undantak av sínum fyrsta ári altíð hevur verið hildið í Ítróttarhøllini á Hálsi, er vorðið ein væl oljað marknaðar maskina sum savnar altráar heilsølur um alt landið undir ein stóran hatt. Í døgunum 10-12. september møtast væntandi eini 2000 fólk í høllini fyri at síggja vørur, deala og hava tað hugnaligt.

Meira enn eitt felags lokkilsi ið handilsfólk illa kunnu standa ímóti, er Messan eitt sera væl umtókt samlingar punkt ið so at siga allar føroyskar heilsølur taka undir við av heilum hjarta. Tiltakið savnar bæði kappingarneytar og partnarar saman til felags áhugamál, og hevur frá fyrsta degi víst seg sum eina dundrandi suksess.

At eingin føroyskur innkeypari við virðing fyri sær sjálvum ídag kann ignorera Vørumessuna, er ein sannroynd sum illa kann afturvísast, tó at fyriskiparin helst vil fyridraga ein annan tóna.

»Hugsanin aftan fyri Vørumessuna er at gera tað lætt og lagaligt hjá handils- og skrivstovufólkum umframt virkis- og stovnsleiðarum at gera síni innkeyp og persónliga samskifta,« segði Birgir Poulsen.

»Fyrr, tá ið heilsølurnar ferðaðust kring oyggjarnar hvør í sínum lagi og hildu framsýningar, var tað heldur strævið hjá innkeyparum at leita sær langar leiðir til eini átta tílík tiltøk undir einum ári. Eg helt at tað mátti kunna finnast ein betri loysn, og soleiðis skipaðu vit í 1998 fyri Vørumessu á Hotel Føroyum. Undirtøkan var bara so stór at vit longu árið eftir máttu hava størri høli og Ítróttarhøllin á Hálsi tekur væl meira. Ikki tí, tað vísir seg heldur ikki at vera nóg mikið av plássi har, men vit mugu heldur royna at klára okkum við verandi gólvvídd. Nú kanska eisini tað verður gjørt okkurt í næstum fyri at fáa meira pláss burtur úr høllini, havi eg hoyrt okkurt um…«

### Íslendingar og danir við

Vørumessan hýsir í ár 32 framsýnarum á 40 básum. Flest allar føroyskar heilsølur eru umboðaðar umframt nakrir tænastuveitarar og einstakir framleiðarar. Produkt nýggjheitir eru fastur táttur á Messuni og millum háljós í ár roknast introduktiónin av føroyskum smøri. Ein annar áhugaverdur táttur er at útlendingar eru farnir at sýna áhuga, so mikið so at tvær útlendskar fyritøkur taka lut sum framsýnarar við egnum bási.

»Á Messuni verður altíð fitt av nýggjum vørum víst fram og eg veit til dømis um at MBM ætlar at vísa upp føroyskt framleitt smør nú… Áhugin fyri Messuni vísir seg at vaksa ár undan ári og vit eru ógvuliga glað fyri at útlendingar eisini vilja taka lut; tann íslendski góðgæta framleiðarin Móna Ehf, sum Jóhannes Guðjónsson umboðar í samstarvi við Kjølbro Heilsølu, verður við í ár og somuleiðis tann danski veitarin Kristian Gravesen, ið heldur ikki er ókendur millum føroyingar. Annars eru sum vanligt nógvar føroyskar heilsølur og aðrir veitarar úr øllum landinum, og talan er um so at siga allar hugsandi vørubólkar.«

Í fjør vitjaðu 1800 innkeyparar Messuna og sum skilst fingu framsýnararnir væl burturúr.

Birgir Poulsen hevur drúgvar royndir innan handil og heilsølu og hevur síðani 1996 verið stjóri á innkeyps ketuni Merko.






Vælkomin á vørumessu í ítróttarhøllini á Hálsi
10.-12. sept.

*Ynskja:*

Jógvan Weihe P/f
Ansni Securitas Føroyar
KBI Sp/f
Landshandilin
Trio Import Sp/f
Føroya Bjór P/f
Miriam Jensen
Tøting P/f
Handilshúsið Sp/f
Norðvág Heilsøla
Ergo & Hjálpartól
Norð Trukk
Føroyaprent
Heilsølan Kjølbro
Damfar P/f
Kemilux Industri P/f
Gimmix
Anith P/f
Poul Hansen P/f
MBM
Poul Michelsen P/f
EB Heilsølan
ADC-Heilsølan
Orkis
Skipafelagið Føroyar
Foss-El Sp/f
Móna Ehf
Krea Lýsingastova
Føroya Lívstrygging
Inventartænastan Sp/f
Viggo Kjeld P/f
Inventartænastan S/pf
Kristian Gravesen

messan.fo2004
www.messan.fo

